## Selir grót til USA

Tað er sagt, at bóndin heystar tað, sum jøðrin gevur, og nú er ein íslendskur bóndi farin at selja grót av landinum. Ómar Antonsson er bóndi við Hornafjørðin, og hesi bæði seinastu árini hevur hann sent fleiri tons av fjørugróti til USA. Í fjør sendi hann 12.000 tons avstað, og higartil í ár hevur hann avskipað 7.000 tons. Amerikanararnir brúka íslendska fjørugrótið til at steinseta svimjihyljar við, og tað er tann døkki liturin, sum er væl umtóktur har yviri.



## Trolari sigldi á land

Seinnapartin í gjár togaði norska sjóverjuskipið KV Senja russiska trolaran Amerloq av einum sandrivi vestan fyri Bjarnoynna. Sjóverjan sigur, at trolarin fekk eftir øllum at døma ongan skaða av stoytinum, men kavarar skuldi kortini fara niður at vissa seg um, at alt er í lagi. Sambært sjóverjuni var væl av vindi og harður streymur, tá trolarin fór á land, og KV Senja royndi tvær ferðir, áðrenn trolarin flotnaði. 24 mans eru við russiska trolaranum.

# Vistferðavinna skjótast veksandi



*Birita Nolsø, SamVit og Dr. John Hull, sum er ein av serfrøðingunum í kanningini hjá National Geographic*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Virðini í Føroyum eru so einastandandi sjáldsom í eygunum hjá øðrum, at hópur av fólki fegin vilja gjalda nógv fyri at koma higar, meta serfrøðingar**

VISTFERÐAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin skipaði SamVit fyri vistferðaráðstevnu í Norðurlandahúsinum, og í blaðnum í dag fara vit at siga eitt sindur um, hvat tey fyrstu, sum vóru á pallinum leygarmorgunin, søgdu. Í blaðnum í morgin er ætlanin at hava meira um ráðstevnuna.

Nú Føroyar eru kosnar at vera mest vitjanarverda oyggjaland í heiminum, er hugsandi, at hetta fer at gera, at nógv ferðandi fara at leggja leiðina hendanvegin.

### John Hull við

Tann eini av serfrøðingunum, sum í kanningini hjá National Geographic var við til at velja Føroyar út sum mest vitjunarverda oyggjaland, Dr. John Hull, lektari á AUT University, helt eisini gestafyrilestur á ráðstevnuni.

Dr. John Hull greiddi frá, hvussu vit best kunnu ansa eftir hesum virðum, so vit framyvir kunnu varðveita okkara støðu á fyrstaplássinum – og fáa eina burðardygga vinnu burtur úr hesum.

Endamálið við ráðstevnuni um vistferðarvinnu er at seta fokus á, hvussu vit menna og marknaðarføra Føroyar sum vistferðavinnuland.

Ráðstevnan snúði seg í høvuðsheitum um, hvussu vit í Føroyum kunnu gerast meira varug við virðini í okkara náttúrliga og ment-



*Hvat gera vit framyvir fyri at menna og varðveita júst tær dygdir, sum onnur virðismeta so høgt við Føroyum?*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Eiga at satsa upp á vistferðavinnu

**- Føroyar at satsa upp á vistferðavinnu. Men neyðugt er, at vit skipa okkum, og her mugu vinna og myndugleikar samstarva og gera neyðugar fyrireikingar, segði Jacob Vestergaard, landsstýrismaður á vistferðavinnuráðstevnuni**

VISTFERÐAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrstur á pallin á vistferðavinnustevnuni í Norðurlandahúsinum var landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jacob Vestergaard.

- Eg googlaði mær hugtakið "ecotourism" - ella vistferðavinna - fram á alnótini og fann fram til, at hetta hugtak einastaðni varð definerað sum: "Ábyrgdarfull ferðing í náttúruni, sum varðveitir umhvørvið og mennir møguleikarnar hjá íbúgvunum á staðnum". Eisini stóð at lesa, at vistferðafólk vanliga eru væl útbúgvin fólk, sum ynskja upplivingar í náttúruni, og sum brúka meira pening enn vanlig ferðafólk gera.

Landsstýrismaðurin segði, at honum kom beinanvegin til hugs, at hetta má vera ein vinna fyri Føroyar - og serstakliga fyri útoyggjar og útjaðaran.

### Viðbrekið og tó

- Okkara land er lítið, og náttúran er viðbrekin, og sjálvandi eiga vit ikki at leggja okkum eftir at fáa so nógv ferðafólk higar sum gjørligt. Heldur eiga vit at dyrgja eftir teimum, ið kunnu hugsast at hava áhuga í okkara náttúru og mentan - og sum vilja gjalda fyri at uppliva hesar partar av okkara samfelag.

Hann helt, at tá ið vistferðafólk er ein væl útbúgvin og medvitaður ferðamannabólkur, er eisini hugsandi, at hesi fólk eru tey, sum gera vart við seg, um okkurt er at seta fingurin á. Fyri at vera trygg í síni avgerð, ímyndar landsstýrismaðurin sær, at vistferðafólk leita sær holla vitan um staðið, tey vitjað – longu áðrenn tey fara út at ferðast.

- Áðrenn vit fara undir eina miðvísa "branding" av Føroyum, sum eitt slag av grønum paradísi mótvegis einum medvitaðum ferðamannahópi úr útheiminum, mugu vit fyrst hyggja inneftir og seta okkum nakrar spurningar.

Jacob helt, at millum spurningarnar, vit eiga at seta okkum, eru hesir: Hava vit nøktandi lóggávu og stovnar at verja okkara náttúru, avspeglar menningin av okkara samfelag skilagóða planlegging - og hvat ítøkiligt hava vit veruliga gjørt til tess at verja náttúruna?

### Avoldað lóggáva

Landsstýrismaðurin ásannaði, at í lóggávuni hava vit onga yvirskipaða landsplanlegging.

- Kommunurnar planleggja sum frægast, og okkara náttúrufriðingarlóg er avoldað. Eisini loyvir okkara veiðilóg veiði eftir somu fuglasløgum, sum okkara fakkunnleiki metir eru hótt.

Men, legði landsstýrismaðurin aftrat:

- Eg sigi ikki við hesum, at vit skulu steðga allari menning og venda aftur til miðøldina fyri at gerast eitt áhugavert stað fyri vistferðafólk.

Jacob segði seg bert vilja vísa á, at vit mugu finna røttu javnvágina millum framgongd og vernd av náttúruni.

Hann nevndi eisini Umhvørvisstovuna, sum er ein savnan av seks ymiskum stovnum og fyrisitingarøkjum innan náttúru,- umhvørvi og lendisfyrisiting.

- Eg meti, at stovnsetanin av Umhvørvisstovuni er eitt satt frambrot á økinum, men ein stovnur virkar ikki uttan nøktandi og nútímans amboð. Tí verður arbeitt við at smíða lógarverk, ið skal til fyri at Umhvørvisstovan kann røkja sínar uppgávur til lítar, segði hann.

Landsstýrismaðurin segði í síni niðurstøðu, at Føroyar eiga at satsa upp á vistferðavinnu.

- Men neyðugt er, at vit skipa okkum, og her mugu vinna og myndugleikar samstarva og gera neyðugar fyrireikingar, soleiðis at karmarnir eru upp á pláss frammanundan, segði Jacob Vestergaard.